








# Konsert fyri alla familjuna

**FYRI ØLL**

*Børnini settu sín serliga dám á konsertirnar um vikuskiftið. Í Klaksvík vóru minst 150 børn á palli, saman við Føroya Symfoniorkestri*

Mynd: Dávur Winther



**TÓNLEIKUR** Um vikuskiftið vórðu árligu Jóla- og familjukonsertirnar hildnar í Havn og í Klaksvík.

Snorri Brend

**Klaksvík/Havn:** Tann fyrra konsertin varð hildin í KÍ-høllini leygardagin, og tann seinna í Ítróttarhøllini í Havn sunnudagin.

Hópin av fóki var eisini komið til áhugaverdu, flógvu og jólaligu konsertirnar, har fleiri ungir og sera dugnaligir solistar sluppu at royna seg.

Rørandi var eisini at hoyra tey mongu fittu børnini - meir enn 150 í tali - syngja so hjartaliga saman við Føroya Symfoniorkestri.

Dirigentur var Bernharður Wilkinson, meðan Annfinnur Heinesen var frásøgumaður.



**FRAMTÍÐ**

*Føroya Symfoniorkestur spældi tvær ferðir um vikuskiftið. Tað sjáldsama var, at bert ein føroyingur var komin úr útlondum at spæla við. Hetta skuldi boða frá ljósari framtíð hjá symfoniorkestrinum*

Mynd: Dávur Winther